# Ð verður skrætt niður

**Plakatirnar av hálvnaknum damum, sum lýsa við nýggjastu útgávuni av Ð-blaðnum sleppa ikki at hanga uppi í friði. – Tær verða skræddar niður innan fyri ein tíma, sigur Jógvan á Høvdanum, blaðstjóri á Ð-blaðnum**

UNDIRHALD
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Stigtakarar handan Ð-blaðið eru vónbrotnir í hesum døgum.

Orsøkin er, at nú teir lótu enn eina útgávu av Ð-blaðnum út, hongdu teir plakatir um blaðið upp ymsastaðni í landinum. Men teir halda, at fólk skræða tær niður aftur.

- Ð plakatin sleppur ikki at hanga uppi longri enn ein tíma, sigur Jógvan á Høvdanum, blaðstjóri.

Menninir handan Ð-blaðið siga seg hava eina hóming av, hvør tað er, ið skræðir plakatirnar niður. Men teir vilja ikki avdúka nøkur nøvn.

- Tað fara altíð at vera fólk her á landi, sum ikki klára at liva við einum tílíkum blaði. Tað er eitt sindur lágt og irriterandi, tí hyggur tú eftir forsíðunum á sjálvt teimum "óskyldigastu" konufólkabløðunum, sum til dømis "Woman" og "I Form" so sært tú, at damurnar har eru enn minni ílatnar enn tær á Ð forsíðunum, sigur Jógvan á Høvdanum.

Jógvan á Høvdanum greiður frá, at hann metir orsøkina til málið verða, føroyingar ikki halda tað sømir seg, at ein føroysk kvinna er lætt ílatin, meðan tey einki hava at fýlast á, tá ið talan er um útlendskar modellir.

- Í londunum rundan um okkum er vilt porno á hvørjari handilshill. Men í Føroyum fáa fólk ilt í reyvina av einum óskyldigum føroyskum blaði, har ein bikiniklødd kvinna myndar forsíðuna. Eg havi ilt við at síggja, hví Føroyar eru so nógv meiri heilagar enn restin av verðini, greiðir Jógvan á Høvdanum frá.




### Handlarnir vita einki

Hóast hvøssu atfinningarnar frá monnunum handan Ð-blaðið, so kenna stjórarnir í Magn, Statoil Føroyar og Kiosk Active einki til, at plakatir verða skræddar niður.

- Vit hava einaferð tikið eina Ð-plakat niður, tá vit skuldu vaska, sigur Karina Larsen, leiðari í Kiosk Active.

Leiðarar í Magn og Statoil Føroyar siga, at í teirra handlum verða ongar plakatir hongdar upp, og kann talan tískil ikki verða um hvørki Magn ella Statoil.

Spurningurin er, um tað kanska er tí, at plakatin og daman eru so lekkur, at onkur vil ogna sær eina slíka heim á kamarið?

# Cafékvøld í KFUM

Nú leygarkvøldið 20. juni 2008 kl 20.00 fer eitt av afturvendandi cafékvøldunum í KFUM í Havn av bakkastokki. Nú er eitt sindur síðani seinast, men hesuferð verður vent aftur við fjølbroyttari skrá. Tá cafékvøld verður leygardagin verður nógv á skránni. Alt frá garvaðum tónleikarum til ung stjørnuskot – alternaternativur popprockur, myrkt metall og gospel tónleikur alt krydrað við fiól og hippie hárbondum. Talan er sjálvandi um 3ST, Reverb, Plastic Hero, Humble Cry og sera fløgu aktuella Guðrið Hansdóttir, so tað er eitt sindur til hvørt oyra. Endamálið við tiltakinum leygarkvøldið er at skapa eitt hugnaligt, rúsfrítt kvøld við góðum tónleiki og øllum, sum har til hoyra millum annað, heimagjørdar pannukøkur. Í summar fylla fyriskiparirnir Sound of Glory TenSing (SoGT ) 10 ár, og skal hetta hátíðarhaldast. - Vit vilja fegin spjaða gleðina við góðum tónleiki – ikki bara okkara egna, siga fyrireikararnir.




